NÁM

HEIMSMÁLINI Á FILMI

HEIMSMÁL
fyri burðardyggari menning

FILMSKAPPING
fyri hádeild og miðnám

VINNINGUR
30.000 kr

Stuttfilmskapping um vatn

Í heyst verður aftur skipað fyri stuttfilmskapping fyri flokkar og bólkar í hádeild fólkaskúlans og á miðnámi.
Ein vinningur áljóðandi 30.000 kr. verður latin.

Heimsmál 6:
Støðið verður tikið í sætta heimsmáli hjá ST, sum er, at øll skulu hava reint vatn at drekka. Í gerandisdegnum skulu heilsu- og reinførisviðurskiftini hjá øllum fólkum vera soleiðis, at góð vesi og kloakkviðurskifti eru allastaðni. Hóast kravið er, at heimsmál nummar seks verður viðgjørt burturav, kann tað eisini styrkja um úrslitið, um tað sæst, at næmingarnir hava sett seg inn í tankan um, at øll tey seytjan heimsmálini samvirka.

Íblástur:
Í september 2024 verður fyrsta Islands Water Congress hildin í Føroyum. Hóast ráðstevnan ikki beinleiðis vendir sær til fólkaskúlan ella miðnám, kann hetta vera ein góður møguleiki fyri næmingar at tosa við serfrøðingar um vatn. Ráðstevnan fer at savna serfrøðingar frá ymiskum oyggjasamfeløgum kring heimin at tosa um nýhugsan og samstarv, tá umræður vatn, og hvussu øll fáa atgongd til vatn. Verður filmurin lagdur væl til rættis, kunnu tit spæla journalistar og hitta fólk, sum vita nógv um vatn. Upptøkurnar kunnu goymast til filmsgerðina.

Kunning til læraran:
Filmurin verður gjørdur sum partur av undirvísingini og skal vera brúkiligur til undirvísing eftir eini ætlan, sum lærarin hjá flokkinum ella bólkinum sendir inn saman við filminum. Arbeiðið kann til dømis vera ein verkætlanaruppgáva, har filmurin er úrslitið. Minnist til, at tosa ella spæla næmingar sjálvir í filminum, skal loyvi gevast frá foreldrum ella verja, um næmingarnir ikki eru myndugir.

Filmarnir verða lagdir á temasíðuna um heimsmálini, sum er á www.snar.fo.
Filmarnir skulu vera klárir at brúka til endamálið, sum er at upplýsa um heimsmálini.
Í hesum føri serliga tað sætta.



NÁM

HEIMSMÁLINI Á FILMI

HEIMSMÁL
fyri burðardyggari menning

FILMSKAPPING
fyri hádeild og miðnám

VINNINGUR
30.000 kr

Minnist til at brúka egnar upptøkur:
- Ikki er loyvt at brúka stock footage, sum tit finna á netinum.
- Brúkið egnar støður og myndir, tá tit vilja siga nakað.
- Tit kunnu brúka vitlíki, um tit sjálvi hava genererað tað og halda tað vera neyðugt til høvið.

Dømt verður eftir:
- hvussu sannførandi søgan er, samanborið við tað, tit ætlaðu, tá tit byrjaðu.
- hvussu tøknin er frágingin.
- hvussu filmisk frásøgusnildi eru brúkt.

Tøkni:
- Filmarnir skulu vera stuttir - í mesta lagi 7 minuttir.
- Filmarnir skulu í minsta lagi vera filmaðir í Full HD og latast inn í mov ella mp4 formati.

Freist:
12. novembur 2024 skal lidni filmurin sendast Námi. Filmurin verður sendur gjøgnum www.wetransfer.com til filmskapping@nam.fo.
Eru spurningar, ber til at spyrja seg fyri á filmskapping@nam.fo.

Vinnarin kosin í Havnar Bio:
Týskvøldið 3. desembur 2024 kl. 19:00 verða nakrir av innkomnu filmunum sýndir í Havnar Bio.
Øll, sum eru við í kappingini, eru boðin við til sýningina, har tit fáa ókeypis poppkorn og kola.
Eftir sýningina verður vinnarin avdúkaður, og útgávuleiðarin í Námi handar vinnaranum vinningin, sum er 30.000 kr.

Í dómsnevndini eru:
- Árni Øregaard, Karina Toftegaard, Sólvá Jónsdóttir, Birgir Kruse.